## DAGSINS MEINING

# Skil má fáast á Fíggjarmálastýrinum

Tað verður mangan sagt, at Karsten situr tungt á kassanum. Hetta kann vera positivt í summum førum, men tað er so langtfrá altíð, at hetta hevur rós uppiborið.

Vit hava tey seinnu árini verið vitni til ógvusliga undirbudgettering hjá landinum á nógvum økjum, tó við markanta undantakinum, ið eitur almenn fyrisiting. Árið verður mangan byrjað við eina skerdari fíggjarlóg, men tá so árið fer at halla, so kemur eykajáttan omaná eykajáttan. Hesar eykajáttanir eru mangan til lønir, útreiðslur í samband við víðlíkahald ella klassing o.s.fr. Við øðrum orðum eykajáttanir, ið ikki kunnu noktast. Spurningurin er so, hví hesar upphæddir ikki vóru við í upprunaligu fíggjarætlanini. Tá man hugsar um, hvussu illa fíggjarlógirnar hava hildið seinastu árini, so kann man diskutera, hvussu góðan fíggjarmálaráðharra vit hava. Ein góður fíggjarmálaráðharri ger eina fíggjarlóg, sum so við heilt fáum undantøkum verður hildin. At skera pr automatikk skapar eina ónda ringrás, har stovnsleiðarar og onnur noyðast at yvirbudgettera, fyri at fáa neyðugu játtanina, og hvat er so vunnið. Eisini er tað átaluvert, at skorið verður í útreiðslum, har deildarleiðarar ella stovnsleiðarar onga ávirkan hava á talið av klientum. Til dømis kann eldraøkið nevnast. Har hevur borgarin krav uppá eina tænastu og hækkar talið av eldri fólkum, so hækka útreiðslurnar eisini, um tænastan skal verða eins. Í nógvum av hesum økjunum noyðist tingið so uppí aftur við einari eykajáttan, tí demografisk viðurskifti eftir øllum at døma ikki viga so tungt í Fíggjarmálastýrinum.

Eykajáttanir eiga at verða eitt amboð til brúk undantaksvís. Alternativt kann man gera sum í Danmark, har ein uppsamlingsjáttan verður samtykt, tá árið er liðugt. Hetta krevur tó rammujáttanir við størri heimildum til landstýrisfólk og ikki minst stovnsleiðarar, ið eru reduseraðir til administratorar við tí stirvnu játtanarskipan, ið vit hava. Politisk detailstýring er av tí illa, og motivatiónin hjá stovnsleiðarum til at spara í rakstrarútreiðslum er eingin, eftirsum skipanin er alt ov stirvin, og tí, at alt fer aftur í stóra pott.

Hetta sæst eisini aftur í einum irrationellum brúksmynstri hjá tí almenna, har forbrúkið fer upp við ársenda fyri at brúka játtaninar, tí okkara játtanarskipan ikki tekur hædd fyri, at verðin ikki steðgar upp 1. januar hvørt ár.

Vit høvdu eitt dømi, har Suðuroyar Sjúkrahús kundi spara pening. Hetta var tungt at fáa ígjøgnum, tí stirvna játtanarskipanin við politiskari detailstýring, har hon ikki hoyrir heima, ger, at tað er eitt undur, at almenn starvsfólk yvirhøvur tíma at koma við góðum hugskotum til sparingar, tá ein trýhundrað túsund krónurs sparing skal heilt upp á tingborð hvørja ferð..

Játtanarskipanin má broytast. Hvussu nógvar milliónir verða ikki brúktar í óneyðugum dupultkontrolli hvørt ár? Hvussu nógv verður spart av ti sama? Hvat er grundgevingin fyri at specifisera so tætt í einari fíggjarlóg, at stovnsleiðarar, ið eru fult út kompetentir til at disponera undir rammujáttanum, har lønir sjálvsagt eiga at hava serstatus, eru reduseraðir til adminstratorar, ið skulu biða um loyvi, hvørja ferða ein budgettlinja skal broytast.

Hesi viðurskifti mugu fáast i rættlag. Vit hava havt ov leysa stýring fyrr, men nú er man farin heilt yvir gevind hinvegin.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Umhvørvið og trygdin skal betrast!!

**Victor Carlsen**

Soleiðis skilji eg boðskapin, ið nú er við at koma fram, tá tað snýr seg um okkara umhvørvi – bæði tað externa og tað interna. »Allur bati bøtur«, verður sagt.

Taka vit tað **interna umhvørvið** fyrst, so er longu nógv gjørt, tí vit hoyra nærum dagliga um forboð og ábøtur, ið verða sett í verk, fyri at trivnaðurin á okkara arbeiðsplássum skal batna, og tað ger hann.

Nú um dagarnar verður nógv gjørt við tað **externa umhvørvið.** Taka vit t.d. málið um Havnarvág, so er longu nú maskina umbiðin sum skal reinsa hav og botn fyri óhumsku, tað veri seg fiskarestir, oljuúrdráttir, tungmetall o.s.fr. Eisini hoyra vit nú um dagarnar um brennistøðirnar, at stórur vandi er á ferð, tá talan er um kemisk evni og annað vandamikið burturkast. Trygdarumboðið fyri arbeiðsmenninar hjá Tórshavnar Kommunu á Brennistøðini á Hjalla, hevur nú gjørt ein rættuligan vørr, og alt gott at siga um tað. Sum ikki einaferð, so er avvarandi myndugleikin fullkomiiliga óvitandi og lovar at gera nakað við málið. Víst verður á skeivleikar í ruskinnsamlingini, at hvør Hanus og Janus soleiðis kann koma og fara sum hann vil við øllum handa burturkasti. Menninir, ið arbeiða á brennistøðini, vita ikki hvat tað er, ið kemur inn á brennistøðina, og sum rætt og rímuligt er, so er tíð uppá at vakna, tí, sum trygdarumboðið sigur, tí tað er ikki munur á, um ein veggur dettur omanyvir persónin og hann doyr uppá staðið, ella talan er um langtíðarárin av kemiskum evnum. Deyðin er vísur í øllum førum. Fáið hetta uppá pláss, men ……

**Andsøgnir**

Góðu tit, ið varða av. Eg havi alla virðing fyri tí, ið nú kemur fram, men kann ikki lata vera við at vísa á viðløgdu mynd, ið er ein plakat, ið danska Kræftens Bekæmpelse hevur gjørt. Henda plakat vísir á tey 4.000 eiturevnini, ið eru í tubbaksúrdráttum. Maðurin er avmyndur í útbúnaði, svarandi til tær vørulýsingar, ið eru á kemiskum úrdráttum (ið eisini koma inn á brennistøðirnar). Tann, ið skal arbeiða við slíkum evnum verður á øllum etikettum, data- og trygdardatabløðum ávaraður um at nýta verndarbúna, svarandi til tey kemisku evnini, ið vøran inniheldur. Men, tá talan er um tubbakk, so verður øðrvísi farið til verka. Tað sýnist sum at hugburðurin er, at einki skal sigast. Tað skal undra meg um ikki onkrir av teimum, ið starvast har uppi ikki eisini roykja, umframt tað at teir arbeiða við kemiskum evnum, og tí eru í enn størri vandabólki. Hvat ger heilsunevndin í Tórshavnar Býráð við hetta mál? Eg havi loyvi at spyrja, tí tá tað snýr seg um alt annað enn tubbakk, so er samfelagið alt á gosi.

Enn kunnu vit keypa eiturevni í smáum pakkum a 10 og 20 stk. Tað einasta, ið verður gjørt er at seta forboð og avmarkingar upp, og tað er gott.

Rættast var at fingið eiturið av handilshillunum. Latið okkum taka fylgjurnar av hesum banni, tí tær vera so ikki nógv øðrvísi enn tann støða vit hava í dag við samanlíknaðum turvelvandi eiturevnum, sum t.d. hash, heroin o.a., at politiið og tollvaldið fer bara at finna nøkur 100 gram her og kanska eitt kilo onkra aðrastaðni, av og á. Revsingin átti eisini tilsvarandi at verið tann sama.

Føroyar tubbakksfríar. Tað er endamálið!!

# Bye Bye Blue Bird í Íslandi

**Íslendingar tykjast enn ikki troyttir av tí, ið føroyskt er, og føroyska bylgjan hevur ikki lagt seg. Nú verður hugt eftir øðrum listagreinum, enn bara tónleikinum**

LIST
*Dagfinn Olsen*



Týr og teirra útgáva av Orminum Langa gjørdist ein landaplága av teimum heilt stóru í Íslandi fyri góðum ári síðani. Og síðani hevur nærum alt føroyskt verið kærkomið og væl dámt í Íslandi.

Tónleikurin hjá Eivor Pálsdóttir, 200, Krit, Makrel, Hanusi Johansen, Clickhaze, Brandi Enni, Kára Sverrisson, Kristiani Blak, A.R.T. og øðrum hava verið á breddanum í longri tíð, men íslendingar hyggja nú eisini aðrar vegir og filmur er tað nýggjasta inn føroyska list í Íslandi.

Háskólabio hevur norrønar filmsdagar og foroyski filmurin Bye Bye Blue Bird stendur á lepanum. Hetta er næsti stóri spælifilmurin hjá føroyska leikstjóranum Katrin Ottarsdóttir. Og hesin filmurin er at hoyra og síggja um, hvar ein so vendir sær í Íslandi í hesum døgum. Bløð og út- og sjónvarp hava føroyska filmin á skránni, so føroyska bylgjan í Íslandi, sum byrjaði við tónleiki, hevur ikki lagt seg, men er bert blivin meira fjøltáttað.


Sosialurin

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




## VIÐMERKINGAR

# Eingin sjálvberandi búskapur við fullveldisflokkunum

**Helgi Abrahamsen**



Í seinastu útgávu av Fregnum stendur ein grein hjá Karsteni Hansen, landsstýrismanni, sum hann kallar "Sambandstræið". Greinin er á tremur við pástandum, sum eftir hondini hava verið fyrigykladir Føroya fólki somikið ofta, at eg haldi at teir nú eiga at verða rættaðir.

"Lat okkum taka nøkur dømi, sum lýsa veruleikan", sigur Karsten Hansen, og so ger hann eina samanbering av støðuni, tá hann tók við sum landsstýrismaður 18. mai 1998, og støðuni 1. januar 2003. Hann sigur hvussu nógvur peningur stóð í Landsbankanum tá hann tók við, og hvussu nógv stóð í sama banka nú á nýggjárinum.

Men Karsten Hansen gloymir at siga, at frá 18. mai til 31. desember 1998, stýrdi fullveldislandsstýrið eftir eini fíggjarlóg, sum landsstýrið og samgongan ið sótu undan teimum høvdu gjørt. Tí er árið 1998 úrslit av politikkinum hjá landsstýrinum sum sat fram til valið í 1998, meðan árið 2002 vísir úrslitið av seinasta heila árinum við Karsteni Hansen sum fíggjarmálaráðharra.

- Og lat okkum so samanbera hesi árini:

Í 1998 hevði landskassin eitt avlop áðrenn avdrøg á umleið 470 mió. krónur. Men sambært fyribilstølunum hjá Gjaldstovuni fyri 2002, er hetta talið nú komið niður á umleið 180 mió. krónur, ella ein afturgongd á umleið 290 mió. krónur.

Her er vert at nevna, at fullveldislandsstýrið fekk heilar 745 mió. krónur meira inn í skatti og avgjøldum í 2002, enn Sambandslandsstýrið fekk í 1998, so tað átti at borið til at lagt eina munandi upphædd til síðis, um Karsten Hansen veruliga sat so tungt á kassanum sum hann sjálvur vil vera við. Men hvat vísa tølini ? Tey vísa, at í 2002 vórðu einans umleið 50 mió. krónur settar inn í Landsbankan.

**Framtíðarútlit**

Eitt er at fullveldislandsstýrið, hóast gulltíðir í 2002, einans hevur lagt 50 mió. krónur til síðis. Eitt annað eru framtíðarútlitini fyri 2003. Her mugu vit staðfesta, at útlitini fyri 2003 eru munandi verri. Vit hava eina fíggjarlóg, sum áðrenn avdráttir og eykajáttanir vísir eitt avlop á 240 mió. krónur. Av teimum skulu 148 mió. krónur nýtast til avdráttir, so øll duga at síggja, at tað skal ikki nógv ganga gali, áðrenn landsstýrið má taka pengar út úr Landsbankanum, fyri at fíggja undirskotið (samanber við at úrslitið fyri 2002 sær út til at blíva 190 mió. krónur verri enn fíggjarlógin vísti fyri einum ári síðani).

Sum øllum kunnugt byggir eitt og hvørt landsstýri á herðarnar á tí undanfarna. Fullveldislandsstýrið hevur notið gott av, at sambandslandsstýrið hevði tillagað almenna sektorin til at klára seg við minni inntøku. Tá fyrsta fullveldisfíggjarlógin fór at virka tann 1. januar 1999 stóðu meira enn 1,1 mia. krónur í Landsbankanum.

Hevði fullveldislandsstýrið bara klárað at hildið fast við fíggjaravlopið sum sambandslandsstýrið skapti, so høvdu yvir tríggjar milliardir staðið í Landsbankanum í dag. Men tað løgna er, at Karsten Hansen beinleiðis reyppar av, at 2,5 milliardir stóðu har tann 31. desember 2002. (Einki verður sagt um, at við mánaðarskiftið februar - mars var talið komið niður aftur á umleið 2,2 mia.) - Hevur hann ikki skilt, at tað stendur nógv minni á bók nú, enn tað veruliga átti at gjørt, ella vil hann ikki skilja tað ?

**Ímyndin av einum fullveldi**

Ferð eftir ferð hoyra vit umboð fyri fullveldisflokkarnar vísa á, hvussu nógv stendur í Landsbankanum, og hetta er vorðin sjálv ímyndin av fullveldinum. - Tað skal bera til at loysa, tí vit eiga so nógvar pengar.

Hetta minnir um stjóran, sum kemur smílandi fram í fjølmiðlunum og sigur, at virki hansara hevur havt stórt undirskot, men tað ger einki, tí likviditeturin er framvegis góður.

Spurningurin er ikki, hvussu nógv vit eiga á bók. Spurningurin er, hvussu gongdin er í løtuni, og hvussu útlitini eru fyri framtíðina.

Gongdin í løtuni er, at hóast vit hava gulltíðir, so verður lítið og einki sett á bók, og útlitini fyri 2003 eru, at vit, hóast góðar tíðir, mugu í Landsbankan eftir peningi fyri at gjalda avdráttir. Hvussu komandi árini fara at verða, um vit fáa eina niðurgongd í búskapinum, tað má tíðin bert vísa.

Men hvussu fullveldisflokkarnir fáa hetta til at vera eina "tilgongd fram ímóti einum sjálvberandi búskapi", tað skilji eg ikki. Fyri mær sær út til, at gongdin hevur verið júst tann øvugta.

# FAS-skattalógin

**Finnleif Guttesen**
*Tvøroyri*



Hetta uppskot frá Karsten Hansen vegna landstýrið um broyting í hesari lóg, vísur og avdúkar, hvussu følsk og óanstendig verandi samgonga er.

Løgmaður helt ikki orð, tá ið hann lovaði kommununum, at tær ongan fíggjarligan miss skuldu hava av skattalættanum, sum landsstýrið gav í 2002.

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum sigur, at vit skulu loysa kommunurnar frá landskassanum og at tað skal vera fult samsvar millum fíggjarliga ábyrgd og avgerðarrættin. Slíkt møsn skal man leita leingi eftir við verandi mannagongd frá landsstýrinum.

**Kommunustýrislimir hentir býttlingar?**

Sum sagt helt løgmaður ikki orð, tá skattalættin bleiv givin í 2002. Kommunurnar fingu ein lítlan lætta í FAS-skipanina við, at lutfallið millum land og kommunur av gjaldinum, bleiv broytt frá 55/45 til 72/28, men var hetta yvirhøvur ikki nokk til at kompensera fyri tær mistu inntøkurnar hjá kommununum, sum skattalættin var orsøk til.

Nú avdúkar landstýrið hvussu falsk og óanstendugt tað er, við at leggja uppskot fram um at hækka lutfallið í FAS-skipanini aftur til 55/45 við afturvirkandi kraft, tí landskassin manglar pengar.

Sagt verður, at kommunurnar skulu fáa hesar pengar aftur, tá ið eldraøkið blívur lagt út til kommunurnar, ella um hetta ikki ber til, verður uppskot lagt fyri tingið um serligt útgjald til kommunurnar við endan av 2003.

Við hesari mannagongd, fyrst at lækka, síðani at hækka og kanska endurrinda til kommunurnar, má landsstýrið halda, at allir kommunustýrislimir eru hentir býttlingar.

**Loysing?**

Formaðurin í Tjóðveldisflokkinum sigur, at kommunurnar skulu loysast frá landsskassanum, hetta er nakað møsn, tí verandi gongd vísur, at tað er landsskassin sum skal loysast frá kommunukassunum.

Landskassin fer djúpt niður í kommunukassarnar við sínum lógarverkið viðv:

**FAS-skipanin:** hví skulu kommunurnar yvirhøvur gjalda til hesa skipan?

**Rentufrádráttinum:** lóg sum kommunurnar onga ávirkan hevur á og skerjur inntøkurnar.

**Botnfrádrátturin:** lóg sum kommunurnar onga ávirkan hava á og skerjur inntøkurnar.

**Ruddið upp**

Vælsignaðir menn og kvinnur, ruddið upp í øllum hesum, áðrenn tit jarðleggja kommunrnar við at leggja fíggjarligar byrðar á tær, sum tit kunnu regulera, sum tykkum hóvar, alt eftir um tað fjarðar ella fløgir í landskassanum.

# At ummæla ummælarar

**- Tvass: Kim Simonsen enn einaferð**

**Oddfríður Marni Rasmussen**



Nógvir ummælarar hava roynt, at ummælt skaldskapin hjá Tóroddi Poulsen. Ongum hevur, eftir mínum tykki, eydnast at skrivað eitt dygdargott ummæli enn, heldur ikki eg sjálvur. Hetta kemur av, at skaldskapur Tórodds er vónleysur at ummæla. Hansara máti at skriva, er so besnissaður, at ummælarin ikki fær sagt tað hann vil, tí um Tóroddur ikki ummælir seg sjálvan, so ummælir hann ummælaran. Hetta ger hann ikki eina ferð, nei, hetta er ein av teimum gjøgnumgangandi træðrunum, í skaldskapi hansara.

Um Tóroddur skal ummælast við teirri tygn, hann hevur uppiborið, skal ein ummælari til, sum hevur so breiða vitan um heimsskaldskap og lagnir, ymiskir rithøvundar hava verið úti fyri. Tað er nærum ógjørligt hjá ummælaranum at seta seg inn í tey ymisku tekstasløgini, og tey ymisku rákini, sum fylla skaldskap Tórodds. Tí hava summir bert lyndi til at skimma tekstin og konstatera, at hetta er enn ein Tóroddsk yrking, og so er sloppið. Men so lætt er tað ikki. Summi ummæla hann kanska mest sum eitt vinarummælið, eitt so-er-tað-gjørt-ummælið. Aðrir vita ikki hvat, ið skal sigast og tí verður bert okkurt barnsligt grifl tveitt niður á pappírið, og sent bløðunum.

Í Sosialinum kvinnudagin 8. mars var so túrurin komin til Kim Simonsen. Tað er tí eg skrivi hetta. Fyri tað fyrsta so var tað ikki Lars Bukdahl, sum ummælti "Blodprøver" í Weekendavísini, tað var Liselotte Wiemer. Um ein velur at skriva eitt sitatummæli, so er neyðugt at tryggja sær, at sitatini eru frá rætta avsendara. Kim setir sær fyri, tá hann ummælir seinasta yrkingasavnið "Royggj" hjá Tóroddi, at fortelja lesaranum hvør er betri ella verri ummælari Lars Bukdahl (sum ikki hevur ummælt bókina) ella Niels Lyngsø, sum er ummælari á Politikken, og hevur ummælt bókina og blanda hesar báðar saman við okkara Carl Johan Jensen. Við hesum er eitt nýtt slag av ummælara komið sær fram - ein ummælari, sum sigur seg ummæla eina bók, men sum ummælir aðrar ummælarar, sum hava ummælt eina aðra bók hjá einum rithøvunda. Tað finnast sostatt ummælarar, sum mæla frá, sum mæla til og teir, sum mala rundan um og so nú teir, sum mæla ummælarar frá og til.

Kim endar aftur hesaferð við at sitera betongyrkjaran mikla Sørin Ulrik Thomsen - hetta evindaliga vassi um, at tann darrandi strongurin, sum heldur oyrunum saman, skal virka til at yrkingin verður til ein "eldhugaðan, østan og hugtiknan sang." Tað loysir seg ikki hjá ummælaranum, at ummæla og hava reinligheitsvanvid, hetta er uppgávan hjá rithøvundanum - at ummæla seg sjálvan og at reinsa upp í sínum egna teksti.